# Johan venur í Esbjerg

Johan Ellingsgaard spældi seg í ár nær einum føstum plássi á besta liðnum hjá B36, og nú roynir ungi offensiv-spælarin at sleppa upp í part innan yrkisfótbóltin. Johan venur í hesum døgum í Esbjerg saman við superliguhópinum hjá felagnum. Eisini er tað ætlanin, at hann skal spæla onkran dystin við eykaliðnum, so venjarin Troels Bech, og aðrir í felagnum fáa høvi at síggja, hvat býr í unga manninum.



# Nú skal meldast til NM

Úttøkukappingin til NM-kappingina í innandurarógving verður á Giljanesi tann 25. november. Tilmelding til kappingina fer fram á heimasíðuni, HYPERLINK „http://www.drekin.fo“ www.drekin.fo, og koma kravtíðirnar til einstøku kappingarnar eisini at framganga á hesi síðu. Kappast verður í seks ymusm bólkum: 12 ár og yngri, 13 til 14 ár, 15 til 18 ár, opin bólkur, 35 ár og eldri og í eini liðkapping.

ÍF-Dráttur 2-3 (20-25, 25-16, 25-11, 20-25, 10-15):

# Dráttur einsamalt á odda

**Dráttur vann toppdystin á Kambsdali ímóti ÍF, og við sigrinum hevur Dráttur lagt seg einsamalt á odda í meistaradeildini hjá kvinnum.**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Sunnudagin var lagt upp til satt brak í toppinum í meistaradeildini hjá kvinnum, tá ÍF tók ímóti Drátti á Kambsdali. Undan dystinum lógu júst hesi bæði liðini einsamøll á odda við átta stigum hvørt, og tí fór vinnarin av dystinum at leggja seg einsamallan á odda í meistaradeildini.

Síðsta vikuskiftið vann Dráttur toppdyst ímóti TB, og tær byrjaðu eisini væl í dystinum móti ÍF. Sjálvt um munurin ikki var tann stóri í fyrsta setti, so hevði Dráttur munin, og at enda vunnu tær eisini hetta settið 20-25.

### Gongd kom á ÍF

Men so vendi ÍF dystinum fullkomiliga. Eftir eina heldur trilvandi byrjan í fyrsta setti spældu kvinnurar úr Fuglafirði sum einglar næstu settini, Í øðrum setti vóru tær nógv betra liðið, og tær vunnu hetta settið trygt 25-16.

Í triðja setti var munurin enn størri. Her var einki, sum bendi á, at Dráttur fór at hava nakran møguleika at vinna dystin. ÍF-kvinnurnar snøgt sagt vundu burtur úr Drátti, og úrslitið gjørdist heili 25-11 til ÍF, og nú sá ikki gott út hjá Drátti. ÍF lá væl oman á hesa løtunam, og Dráttur sá ikki út til at hava kreftir at koma aftur hesa løtuna.

### Dráttur svaraði aftur

Hvat hendi eftir hetta, er ilt at meta um. Kvinnurnar hjá Drátti megnaðu tó á ein ella annan hátt at stríða seg innaftur í dystin, og fjórða settið vann Dráttur 20-25, og nú skudli javnbrótari til fyri at finna ein vinnara í toppdystinum.

Her var Dráttur enn einaferð oman á, og tær vunnu eisini javnbrótaran trygt 10-15. Sostatt hevði Dráttur vunnið sín næsta toppdyst á rað, og við sigrinum hava tær lagt seg einsamallar á odda í meistaradeildini hjá kvinnum.

Toppdysturin bleiv júst so undirhaldandi, sum áskoðararnir á Kambsdali høvdu vóna, og hetta úrslitið vísir, at munurin á liðunum í meistaradeildini hjá kvinnum er ikki serliga stórur.




Mjølnir-Fleyr 3-1 (26-24, 12-25, 25-19, 25-22) ÍF-Nøvan 3-0 (ÍF vann uttan dyst):

# Mjølnir eltir oddaliðið

**Mjølnir vann sín triðja sigur á rað í meistaradeildini hjá monnum, tá teir á heimavølli vunnu 3-1 sigur á Fleyr. Við sigrinum leggur Mjølnir trýst á oddaliðið ÍF, sum tó vann uttan dyst hesuferð, tá Nøvan ikki møtti upp á Kambsdali.**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Mjølnir hevur verið eitt av liðunum, sum seinastu umførini hevur roynt at hingið í oddaliðnum ÍF. Sunnudagin tóku teir ímóti Fleyr í einum dysti, sum á pappírinum sá ómetaliga spennandi út. Um Fleyr megnaði at vinna, so kundu teir leggja seg undir liðuna á Mjølnir og Fram á øðrum plássi, men um Mjølnir vann dystin, so kundu teir leggja trýst á ÍF, samstundis sum teir kundu økja um munin niður til aftaru liðini.

### Vunnu hvør sítt set

Mjølnir var eisini liðið, sum fekk betra byrjanina henda dagin. Liðini fylgdust væl at í fyrsta settinum, og munurin var ikki tann stóri. Tá settið nærkaðist endanum vóru liðini enn púra jøvn, men at enda megnaði heimaliðið at draga frá, og teir vunnu eisini fyrsta settið 26-24.

Í øðrum setti kom Fleyr út sum eitt ódnarveður. Teir spældu Mjølnir niður, og heimaliðið fekk ongantíð ein fót til jørðina í hesum settinum, sum Fleyr at enda vann heili 12-25.

Nú stóð aftur á púra jøvnum, og havnarliðið sá út til at vera komið veruliga í gongd.

### Mjølnir setti punktum

Í triðja setti var gongdin tó aftur vend. Nú var Mjølnir omaná stóran part av settinum, og nú sá Fleyr ikki út til at hava tað alt ov gott. Mjølnir var komið út til settið í heilt øðrum lag, og teir megnaðu eisini at vinna hetta settið rættiliga trygt við úrslitinum 25-19.

Nú skuldi Fleyr vinna bæði tey síðstu settini, um teir ætlaðu at vinna dystin, og teir royndu eisini av øllum alvi at vinna fjórða settið. Men enn einaferð vóru klaksvíkingarnir sterkari, og Mjølnir vann síðsta sett 25-22. Sostatt hava teir nú átta stig fyri seks dystir, og teir eru fýra stig aftanfyri oddaliðið. Hjá Fleyr sær hinvegin ikki so gott út. Teir hava bert fýra stig, og nú byrjar munurin at vaksa upp til ovastu liðini.

### ÍF vann uttan dyst

Ein annar dystur skuldi eisini vera um vikuskiftið, tá oddaliðið ÍF skuldi taka ímóti botnliðnum Nøvuni. Henda dystin vann ÍF uttan dyst, tí Nøvan møtti ikki. Sostatt eru fuglfirðingarnir enn ósigraðir í deildini, meðan Nøvan enn hevur sín fyrsta sigur til góðar. Undan kappingini var sagt úr Nøvuni, at teir ætlaðu at vinna eitt sett í ár, men um hetta skal lata seg gera, so noyðast teir at møta upp til sínar dystir, tí uttan uppmøting kunnu teir ikki vinna nakað sett!